# Klaksvíkingar føroyameistarar

**Hóast teir taptu móti havnarmonnum í seinasta umfari, eydnaðist tað klaksvíkingum í harðari kapping við kollfirðingum at vinna føroyameistaraskapin**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*



*Klaksvíkingar høvdu styrkt sær við útisetanum Eyðun Nolsøe*

Loksins eydnaðist tað. Síðani 1999, tá teir seinast vunnu FM, hava klaksvíkingar mangan verið tætt við, men sum oftast hava teir bert rokkið 2. plássið. Í Hósvík sunnudagin høvdu teir sjálvir møguleikan at avgera oddastríðið. Fingu teir 3 stig móti havnarmonnum, kundu kollfirðingar ikki náa teimum. Men so væl spældi klaverið ikki, skuldi tað vísa seg

Klaksvíkingar høvdu styrkt sær við útisetanum Eyðun Nolsøe, sum sunnudagin røkti 2. borð. Havnarmenn høvdu í seinnu helvt vunnu sær nógv stig, og kundu teoretiskt vinna FM-heitið, um alt fløskaði seg ómetaliga væl. Tað kravdi ein 4-0 sigur, samstundis sum kollfirðingar ikki máttu fáa ov nógv stig móti toftamonnum.

## Øgiligur spenningur

Klaksvíkingar komu í vandasjógv beinanvegin móti havnarmonnum. Rani Nolsøe bjargaði sær javnleik móti Boga Ziska, eftir at hava staðið ivasamt í byrjanini. Stutt eftir bjóðaði Haldur Suni Johansen Tummasi M. Anthoniussen javnt, og hesin tók gleðiliga ímóti tilboðnum. Tummas stóð nevnliga nakað verri.

Ólavur Simonsen vann sær eina finnu ímóti Martin Poulsen, men tað varð ikki nóg mikið. Eisini á 1. borði bleiv úrslitið javnt. Eyðun Nolsøe kom í miðspælinum undir stórt trýst í talvinum móti Olaf Berg. Olaf vann trygt eitt drúgvt talv, tá Eyðun í taptari støðu sum frægast leingi royndi at halda lív í talvinum, við tí fyri eyga at leggja trýst á kollfirðingar.

Toftamenn vóru klaksvíkingum ein góð hjálp. Óvæntað eydnaðist tað teimum at fáa hálvtannað stig frá kollfirðingum. Fyri kollfirðingar man hetta kennast sera skuffandi. Teir blivu tískil hálvt stig ov stuttir.

Andreas Andreasen fekk á 1. borði ein góðan javnleik móti Hans Kristian Simonsen, meðan fótbóltssnillingurin Øssur Hansen vann á 4. borði á Grettir Djurhuus.

Tvey úrslit sum klaksvíkingar sanniliga vórðu fegnir um! FM-heitið fór uppiborið til Klaksvíkar. Teir hava verið mest støðugir í ár. Tillukku við føroyameistaraskapinum KTF!

Sandavágsmenn flyta niður í 2. deild, meðan vestmenningar vunnu 2. deild og vera aftur at síggja í 1. deild komandi kappingarár.

Sí úrslit, einkultúrslit og støður aðrastaðni í blaðnum í dag.

## Hálvt stig frá næsta norminum

Heini Olsen, sum fyri tveimum vikum síðan ognaði sær sín fyrsta IM-norm í kapping í Norra, hevði sín næsta norm í aðru hondini sunnudagin, men bleiv steðgaður á málstrikuni; Í níggjunda og seinasta umfari í stóru opnu kappingini hjá Arbejdernes Skakforening, var kravið hjá Heina minst ein javnleikur ímóti IM Emil Hermansson (2429). Heini hevði eitt skiftið fyrimun í talvinum, bjóðaði eisini svianum javnt, men tíverri mátti hann lúta.

Hóast ongan norm á hesum sinni, varð úrslitið hjá Heina sera gott; 6 stig av 9 møguligum, har mótstøðan var sterk. M.a. tveir stórmeistarar og tveir altjóða meistarar. Klaksvíkingurin vinnur sær enn fleiri ratingstig omaná stóra ratingfongin frá kappingini í Norra herfyri.

Flóvin Tór Næs hevði eina hampuliga kapping. Alt gekk eftir ánni fyrstu fýra umførini, men í seinastu fimm umførunum fekk hann einans eitt stig, og endaði tí við 5 stigum. Heini Danielsen hevði ein óføra góðan endaspurt við at vinna seinastu trý talvini. Hann bleiv fremsti føroyingur við 6,5 stigum og vinnur sær fitt av rating. Danielsen hitti tó ikki eins sterka mótstøðu sum Heini O. og Flóvin gjørdu.

Vinnararnir av kappingini blivu GM Jonny Hector (2518) úr Svøriki og amerikumaðurin GM Nick De Firmian (2523) við hvør sínum 7,5 stigum.

## Talvið hesa vikuna

**Tatjana Vasilevich (2393) - Heini Olsen (2255)**
AS04 Centenary Copenhagen (7.umf), 13.02.2004

**1.d4 Rif6 2.c4 e6 3.Ric3 Bb4** (Heini telvar oftani Nimzoindiskt) **4.g3 0—0 5.Bg2 d5 6.Rif3 dxc4 7.0—0 Ric6 8.Re1 Rid5 9.Fc2 Be7 10.a3 Ria5!** (Heini ætlar sær at halda uppá c-finnuna og leggja ávíst trýst á hvítu støðuna) **11.Bd2 Rib3 12.Rad1 Rb8 13.e4 Rixd2 14.Rxd2 Rixc3 15.Fxc3 b5 16.Fe3 Rb6 17.Rc1 Bb7 18.h4 Rd6 19.Rcd1 Fa8!** (Sterkt telvað. Svartur hevur finnu meir og betri støðu) **20.d5 exd5 21.exd5 Re8 22.Rie5 Bf6 23.f4 a6 24.Fc5 Fd8 25.Rig4 Be7 26.Ff2 Bc8 27.Rie5 Bf6 28.Ric6 Fd7 29.Kh2 g6 30.a4 bxa4 31.Fc5 Fg4** (Heini hevur greiða ætlan, sum skjótt verður framd í verki) **32.Rie5**



**Støðumynd eftir 32. Rie5**

**32...Rxe5!** (Avgerandi leikur!) 33.Fxc7 (Ikki hjálpir tað hvítum við 33.fxe5 Bxe5 34.Fe3 Fxh4+ 35.Kg1 Bxg3 og støðan er klárt vunnin fyri svartan) **33...Re3 34.Fxd6 Fxg3+ 35.Kg1 Re1+ 36.Rxe1 Fxe1+ 37.Bf1 Be7 38.Fc7 Fxd2 39.Fxc8+ Kg7 40.Fxc4 Fxb2** (a-finnan avgerð talvið. Hvítur kundi givist, men hann treiskast) **41.d6 Bxd6 42.Bg2 Fd2 43.f5 Fe1+ 44.Bf1 Fe3+ 45.Kh1 Fg3 46.Fc2 Fxh4+ 47.Kg1 Fg3+ 48.Kh1 a3 49.fxg6 hxg6 50.Bxa6 Fh3+ 51.Kg1 Fh2+** Eftir uppbýtið rennur a-finnan á mál 0—1

# Talvúrslit og -støður

### 1. deild

10. umfar

| | | |
|---|---|---|
| **Havnin** | **Klaksvík** | **2,5-1,5** |
| Martin Poulsen | Ólavur Simonsen | 0,5-0,5 |
| Olaf Berg | Eyðun Nolsøe | 1-0 |
| Bogi Ziska | Rani Nolsøe | 0,5-0,5 |
| Haldur Suni Johansen | Tummas M. Anthoniussen | 0,5-0,5 |
| **Kollafjørður** | **Toftir** | **2,5-1,5** |
| Hans Kristian Simonsen | Andreas Andreasen | 0,5-0,5 |
| Torbjørn Thomsen | Helgi Joensen | 1-0 |
| Eyðálvur Johannesen | Justinus Hansen | 1-0 |
| Grettir Djurhuus | Øssur Hansen | 0-1 |
| **Hvalvík** | **SandavágurT** | **3,5-0,5** |
| Martin Brekká | Torkil Nielsen | 0,5-0,5 |
| Finnbjørn Zachariassen | Bernhard Augustinussen | 1-0 |
| Sámal Christiansen | Sonni Nielsen | 1-0 |
| Gunnar Joensen | Jónfinn Thomsen | 1-0 |

### Endaliga støðan

| | |
|---|---|
| 1. Klaksvík | 26,5 |
| 2. Kollafjørður | 26,0 |
| 3. Havnin | 24,0 |
| 4. Hvalvík | 20,5 |
| 5. Toftir | 14,5 |
| 6. Sandavágur | 8,5 |

### Einstøku avrikini hjá FM-liðnum KTF:

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Ólavur Simonsen | 6,5 av 10 |
| 2 | Eyðun Nolsøe | 0/1 |
| 3 | Rani Nolsøe | 5,5/9 |
| 4 | Finnbjørn Vang | 3/6 |
| 5 | Tummas M. Anthoniussen | 8,5/10 |
| 6 | Ingolf Gaard | 2/3 |
| 7 | Esbern Christiansen | 1/1 |

### 2. deild

| | | |
|---|---|---|
| Havnin | Vestmanna | 0,5-3,5 |
| Klaksvík | Kollafjørður | 3-1 |

### Endaliga støðan í 2. deild

| | |
|---|---|
| 1. Vestmanna | 25,5 |
| 2. Havnin | 16,5 |
| 3. Klaksvík | 15,0 |
| 4. Kollafjørður | 13,5 |
| 5. Vestmanna 2 | 9,5 |

### 3. deild

| | | |
|---|---|---|
| Havnin 4 | Rókur | 3,5-0,5 |
| Miðvágur | Vestmanna | 0,5-3,5 |
| Gøta | Havnin 3 | 0,5-3,5 |

### Endaliga støðan

| | |
|---|---|
| 1. Havnin 3 | 40,0 |
| 2. Havnin 4 | 30,5 |
| 3. Gøta | 29,5 |
| 4. Sandavágur | 25,5 |
| 5. Rókur | 17,0 |
| 6. Vestmanna | 16,0 |
| 7. Miðvágur | 9,5 |

### Unglingar

| | | |
|---|---|---|
| HTb | GT | 0-4 |
| VTb | HTa | 0-4 |
| KTFb | VTa | 4-0 |
| ST | KTFa | 0,5-3,5 |
| TT | MT | 2,5-1,5 |

### Endaliga støðan

| | |
|---|---|
| 1. KTFa | 33,5 |
| 2. HTa | 27,5 |
| 3. GT | 27,0 |
| 4. KTFb | 25,0 |
| 5. VTa | 20,5 |
| 6. TT | 20,0 |
| 7. ST | 19,5 |
| 8. HTb | 15,0 |
| 9. MT | 14,0 |
| 10. Rókur | 7,5 |
| 11. VTb | 0,5 |






## Vilt tú verða eitt betur sølu- og tænastufólk?

Er títt starv at selja matvørur, klæðir, timbur, olju, bilar, køkar, tógv ella annað. Tekur tú telefonina, situr tú við kassan í einum peningastovni, ella bjóðar tú aðra tænastu fram, so er hetta júst eitt skeið til tín.

Tað er tað fyrsta inntrykkið sum avgerð, um kundin vil keypa eina vøru ella tænastu frá einari fyritøku. Um ein fyritøka ikki hevur starvsfólk, sum duga at koma á "bylgjulongd" við kundan - hvørja nyttu gera góðar vørur ella tænastur tá?

Skeiðini sum verða, eru til øll fólk, sum hava beinleiðis og óbeinleiðis við sølu og tænastu at gera.

- **Selur tú vørur ella tænastur?**
- **Hevur tú nógv við menniskjur at gera?**
- **Tekur tú telefonina?**
- **Situr ella stendur tú við ein disk?**

**So er hetta skeiðið júst til tín!**

**Hvør, hvar og nær:**
Tað er kendi danski skeiðhaldarin Kim Müller, sum kemur at undirvísa. Fyrsta skeiði verður á Hotel Føroyum fríggjadagin 12. mars, frá kl. 13.00 til 16.00, tað næsta á Hotel Føroyum leygardagin 13. mars, frá kl. 13.00 til 16.00 og tað triðja verður í Tekniska Skúla í Klaksvík sunnudagin 14, mars, frá kl. 13.00 til 16.00. Kostnaðurin fyri hvønn luttakara er Kr. 960,- u/mvg.

**Tekna teg:**
Tey, sum hava áhuga at luttaka, kunnu venda sær til IRIS á tlf 456390, Fax 456391 ella á teldupostadressu iris@iris.fo

IRIS

GARÐSENDI 2 · POSTSMOGA 240 · FO-700 KLAKSVÍK
TEL 456390 · FARTEL 216390 · FAX 456391 · IRIS@IRIS.FO · WWW.IRIS.FO

**Um skeiðið:**
*Skeiðið gevur tær innlit í, hvat er neyðugt við tí persónliga atburðinum, og málburðinum, tá ið tú veitir einum viðskiftafólki eina tænastu ella vøru. Á skeiðinum fært tú innlit í, hvussu tú tryggjar tær, at tú verður uppfataður positivt, og fært har við skapt tað rætta sambandið. Á henda hátt tryggjar tú tær, at kundin minnist tykkara samskifti á ein positivan hátt, og vendir aftur til júst tykkara fyritøku. Tú fært nøkur amboð at arbeiða við, ið tryggjar eitt trygt og einfalt samskifti, ið tú beinanvegin kanst nýta í tínum dagliga arbeiði.*



**Kim Muller**
*Kim Muller er 45 ára gamal, og hevur verið stjóri í tí privatu vinnuni 12 tey seinastu árini. Arbeiðsøkini, ið hann hevur fingist við, eru innan sølu, tænastu og framleiðslu. Kim er útbúgvin Maskinkonstruktør, HD, I/Ø, MasterPractitioner í NLP, Persónligur Coach, skeiðleiðari og umfram tað, so hevur hann eisini eina útbúgving í samskifti frá Anthony Robbins Mastery University í USA. Kim hevur arbeitt hjá CarlF, Sani Stål, Jysk Kemi, York, ABB, Inco, v.m.*



## Góðir brúktir bilar

| | |
|---|---|
| **Nissan Almera 2.0 Diesel GX** reyður, árg 1996, 4 hurðar, km 90.000 — **72.000** | **Opel Astra 2.0 Di Sedan** vínreyður, árg 2000, 4 hurðar, km. 97.000 — **115.000** |
| **Nissan Almera 1.5 Comfort** bláur, árg 2002, 5 hurðar, km 11.000 — **135.000** | **Opel Astra 1.7 DT** grønur, árg 1997, 4 hurðar — **65.000** |
| **Nissan Primera 1.6 Player** svartur, árg 1995, 4 hurðar, km 139.000 — **67.000** | **Opel Vectra 1.7 DT** grønur, árg 1995, 4 hurðar, km. 210.000 — **65.000** |
| **Peugeot 106 Diesel** grønur, árg. 1997, 3 hurðar, km. 135.000 — **69.000** | **Opel Vectra 2.0 DT Station Car** svartur, árg 1997, 5 hurðar, km. 182.000 — **95.000** |
| **Peugeot 306 XR 1.4** reyður, árg 1999, 5 hurðar, km 40.000 — **95.000** | **Opel Vectra 2.0 CD** svartur, árg 1997, 4 hurðar, km. 87.000 — **95.000** |
| **Peugeot 306 XR 1.4** reyður, árg 1999, 5 hurðar — **89.000** | **Ssangyong Musso 2.9D 4x4 100 HK Van** grønur, árg 1997, 5 hurðar, km. 102.000, seldur fyri kunda — **130.000** |
| **Peugeot 306 TD við skaða** reyður, árg. 1996, 5 hurðar, km. 213.000, selist fyri kunda — **15.000** | **Honda Accord 2.0** gráur, árg 1999, 4 hurðar, km. 96.000 — **155.000** |
| **Peugeot 405 1.6 GR** bláur, árg. 1989, 4 hurðar, km. — **27.000** | **Hyundai Elantra 1.6 GLS** grønur, árg 1998, 4 hurðar, km. 69.000 — **67.000** |
| **Peugeot 406 1.8** grønur, árg. 1997, 4 hurðar, km. 129.000 — **99.000** | **Toyota Corolla 1.6 VVT-i St. Car Linia Terra** grønur, árg 2002, 5 hurðar, km. 22.000 — **155.000** |
| **Peugeot 406 ST 2.0 Hdi v/aircon** vínreyður, árg. 1999, 4 hurðar, km. 120.000, fyrr 145.000 — **nú 135.000** | **Toyota Avensis 1.8 Sol** bláur, árg 2001, 4 hurðar, km. 48.000 — **178.000** |
| **Peugeot 406 ST 2.0** gráur, árg. 1999, 4 hurðar, km. 63.000 — **130.000** | **Citroen Xantia 2.0 Hdi Station Car** grønur, árg 2000, km. 110.000 — **148.000** |
| **Opel Agila 1.2** grønur, árg 2001, 5 hurðar, km. 36.000, fyrr 110.000,- — **nú 95.000** | **Ford Fiesta 1.3** reyður, árg 1997, km. 88.000 — **46.000** |
| **Opel Corsa 1.4 Swing** grønur, árg 1997, 5 hurðar, km. 84.000 — **68.000** | **Ford Escort 1.8** bláur, árg 1995, 4 hurðar, km. 101.000 — **59.000** |
| **Opel Corsa 1.4 Swing** grønur, árg 1999, 5 hurðar, km. 62.000 — **79.000** | **Fiat Scudo 2.0 Hdi VAN** hvítur, árg 2002, 4 hurðar, km. 35.000 — **v/mvg 160.000** |
| **Opel Astra 1.6 16V** hvítur, árg 1996, 4 hurðark, km. 119.000 — **64.000** | **Fiat Marea 1.9 DT Station Car** ljósabláur, árg 1997, 5 hurðar, km. 135.000 — **78.000** |

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Fyrispurningar kunnu vera settir á telefon 34 54 00,
eisini ber til at senda teldupost til: nissan@nissan.fo
Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

**P/F Meinhardt Arge**
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

Sosialurin 341800



**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

## Leiðari til tænastudepilin

Spennandi og avbjóðandi starv sum leiðari til tænastudepilin á Landssjúkrahúsinum er leyst at søkja. Umsóknarfreist 25. februar 2004.

Les meiri á heimasíðu okkara: www.lsh.fo

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn



VINNUHÚSIÐ
House of Industry

## Aðalfundur

**í Havnar Handverksmeistarafelag**

Aðalfundur í Havnar Handverksmeistarafelag verður hósdagin 19. februar 2004 kl. 19.30, á Hotel Hafnia (Parnassinum).

Skrá sambært lógum felagsins § 11.

**Havnar Handverksmeistarafelag**

Vinnuhúsið · Boks 1038 · R. C. Effersøesgøta 30
FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 311864 · Fax +298 317278
E-mail: industry@industry.fo



**Frá Arbeiðsmannafelagnum Framtíðini í Vági**

## Ársaðalfundur

verður í Framtíðini 3. mars kl. 14.00.

Skrá sambært lógum felagsins.

Um ikki nóg nógvir møta, verður eykaaðalfundur hálvan tíma seinni.

**Arbeiðsmannafelagið Framtíðin**



## Íbúð til leigu

Ein ljós íbúð á Argjum við sera góðum útsýni yvir Havnina og Sandagerð til leigu.

Íbúðin hevur nýggjan køk, stovu, baðirúm og 2 kømur, umframt vaskikjallara og turkirúm. Íbúðin er høvuðsumvæld og alt er nýtt. Kostnaður kr. 5.400 pr. mðr. við hita. Íbúðin verður leiga út frá 1. mars 2004.

Um áhugi er í hesum, vinarliga ring 21 00 51.



## Partabræv til sølu

1 partabræv í Sp/f Niels Paula til sølu fyri hægsta boð.

**Tlf. 777 211**